

*Nú hevur P/F Christian í Grótinum keypt ísfiskatrolararnar Nónhamar, Fjalshamar, Safir og Smaragd*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Eitt íkast til at lata Kósina upp

**- Tey fýra skipini, sum vit nú hava keypt, eiga stívliga 400 fiskidagar tilsamans. Upp á sikt er hetta ikki nóg stórt grundarlag til rakstur av øllum skipunum, men vit arbeiða við ymiskum ætlanum, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari**

SKIPAKEYP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Christian í Grótinum í Klaksvík hevur nú keypt teir fýra ísfiskatrolararnar, sum Føroya Banki í fjør heyst keypti á tvingsilssølu. Hetta eru skip, sum vóru undir hattinum hjá Maru Seafood, har Jóhan Páll Joensen er stjóri. Tveir aðrir ísfiskatrolarar, Navarin og Borgarin, fóru undir hamaran um somu tíð, sum hesir fýra, og teir eru síðan seldir til Suðuroyar.

Tá suðuroyingar keyptu Navaran og Borgaran, skiltist, at Føroya Banki samstundis seldi felagnum TG Fish fiskidagarnar hjá einum skipi aftrat.

Kristian Martin Rasmussen, reiðari, vil ikki upplýsa, hvussu nógv teir hava keypt teir fýra ísfiskatrolararnar fyri. Hann ásannar kortini, at skipini eru keypt nóg dýr, sum hann tekur til.

Spurdur, hvussu nógvar fiskidagar hesi fýra skipini eiga tilsamans, sigur reiðarin:

- Talan er um tvey vanlig loyvi – og tvey smærri loyvi. Samlaða talið av fiskidøgum hjá øllum fýra skipinum er stívliga 400.

Kristian Martin sigur, at upp á sikt eru hesir 400 dagarnir ikki nóg mikið til lønandi rakstur.

- So, vit fara at arbeiða við ymiskum møguleikum. Ein er, at vit møguliga kunnu útvega okkum eyka fiskidagar, ein annar er samstarv við aðrar, og ein triði er, at onkur av skipunum ikki fara á fiskiveiði. Allir møguleikar eru opnir. Nú hava vit keypt skipini, og nú verður farið hyggja at, hvørjir møguleikarnir eru.

Reiðarin í Klaksvík dylur ikki fyri, at keypið av teimum fýra ísfiskatrolarunum er teirra íkast til at fáa Kósavirkið, sum seinastu mánaðirnar hevur verið stongt, latið uppftur.

- Jú, tað er eingin loyna, at hetta er okkara íkast til, at virkið verður latið uppaftur, sigur Kristian Martin Rasmussen.

Spurdur um manning, sigur reiðarin, at teir longu hava verið í samband við tveir av skiparunum, sum vóru umborð á ísfiskatrolarunum, ið Maru Seafood áður átti.

- Hesir báðir eru til reiðarar at koma umborð aftur, og tað verða teir, sum koma at seta restina av fólkinum.

Kristian Martin ásannar, at manningin er altavgerandi fyri, at samanhangur fæst í skipaøkinum. (rakstinum)

- Nú vóna vit bara, at fiskiskapurin heldur sær, og at oljan ikki rýkur uppaftur.

Reiðarin væntar, at tey fyrstu tvey skipini, Fjalshamar og Nónhamar, kunnu loysa um ikki so langa tíð, meðan Safir og Smaragd í fyrsta lagi skulu hava klassapappírin upp á pláss.

- Tað fer at kosta okkum nakrar miljónir at gera skipini klár til fiskiskap, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari.

Sosialurin
Sosialurin i

MODUL I - 6., 7. og 8. mars 2009

ENNEAGRAM
- mennandi
spennandi
& stuttligt

**FØLIR TÚ VIÐHVØRT**, at tú ikki rættiliga skilir tínir starvsfelagar? Ella at teir ikki skilja teg? Bresta tit ov ofta saman ella tosa forbí hvønn-annan?

**VIT HAVA KANSKA LYNDI TIL** at halda, at flestu fólk eru sum vit sjálv. Av tí sama verður samskifti við onnur ikki altíð so gott, sum tað kundi verið.

**SKALT TÚ SAMSKIFTA VÆL** og fáa mest møguligt burturúr bæði vinnuligt og privat, hevur tað stóran týding at kenna fyrst og fremst tína egnu, men eisini aðrar vangamyndir.

**ENNEAGRAMMIÐ HJÁLPR** okkum at skilja ymiskar persónstypur ella vangamyndir. Hetta hava kendar og vælriknar fyritøkur so sum Microsoft, Novo Nordisk og Pfizer í Danmark tikið til sín. Hesar brúka Enneagrammið í teirra innanhýsis samskifti.

**VIÐMERKINGAR FRÁ LUTTAKARUM**
"Tað var yvirraskandi beinrakið...Eg lærdi nógv um meg sjálva, bleiv beríka og fekk stórt innlit." Johild Thomsen

"Ennegrammið kann brúkast til næstan alt..." Regin Berg

"Góð innleiðing - Sera gott v/ livandi fyrimyndum!" Ingunn Danielsen

"Eg haldi at hetta er so beinleiðis brúkiligt og sera viðkomandi grundarlag undir sjálvsmenning og menning av samvirkandi felagsskapum..." Leiðari, Tórshavnar Kommuna

**KOSTNAÐUR**
Einans 3475,00 fyri alt vikuskiftið

**TILMELDING**
Tilmelding og les meira á www.synergi.fo.

Synergi - Tórshavn - 22RING (227464) - synergi@synergi.fo

Synergi





Workshop 19. mars 2009

Starvsfólkahondbókin
- eitt *MUST* úr HR-amboðskassanum

**Hvussu gera tit** á tínum arbeiðsplássi við flextíð, avspáking, arbeiðsbilum, royking, jarðarferðum, alkohol, merkisdøgum, eitt nú starvsdøgum, rundum føðingardøgum osfr.?

**Er tað eitt sindur hips um haps?** Uppfinnur tú trúliga tann djúpa tallerkin umaftur og umaftur? Og kundi tú hugsað tær tað meiri skipað? So fell ikki í fátt. Her er hjálp og inspiration at heinta á hesari workshoppini, sum hevur fingið sera góðar eftirmetingar - onkuntíð heili 10,2 í meðal eftir 13' skalainum.

**Workshoppin snýr seg um**, hvussu man kann skipa arbeiðsplássið í sambandi við ynskir hjá starvsfólkum, samstundis sum man hevur fokus á botnlinjuna. Hetta er ein workshop fyri fyritøkur, sum antin hava ein starvsfólkapolitik, sum treingir til dagføringar og fyri fyritøkur, sum ongan niðurfeldan starvsfólkapolitik hava.
**Nakrar greiðar reglur** um tey mest grundleggjandi tingini á arbeiðsplássinum, eru gull verdar. Tú sleppur undan frustratiónum, øvundsjúku og kegli, ferð aftaná ferð, um tey somu tingini.

**Fløgu heim við!**
Tað besta er, at tú fært eina skabelón av einari starvsfólkahondbók við tær heim á fløgu (25 síður) og tí er tað lætt at seta í verk.

Lættari kann tað ikki gerast.

**Tilmelding og les meira** á www.synergi.fo, ella ring 32BELL (322355).

**Tilmeldingarfreist:** 26. februar 2009, men fleiri pláss eru longu farin, so tað er at skunda sær;-)

**Vælkomin til tiltøk hjá Synergi.**

www.synergi.fo

Synergi